# Ungur HB'ari til EB/Streym

EB/Streyur hevur gjørt avtalu við 19 ára gamla Dánjal Davidsen, sum uppvaksin í HB. Heimasíðan hjá EB/Streymi skrivar, at undir havnamaðurin er vinstrabeintur og skal verða við í kappingini um at spæla á vinstra bakki. Í fjør spældi John Heri Dam og Símun Eliasen á hesum plássi, men hvørgin teirra er at finna í EB/Streymi nú. Í onkrum venjingardysti hevur venjarin roynt álopsspælaran Leif Niclasen á vinstra bakki.




# Johan Ejvind til TB

Beint undan freistini fyri spælaraskifti flytti havnamaðurin Johan Ejvind Restorff Mouritsen úr HB og til TB at spæla. Tað skrivar heimasíðan hjá TB. Johan Ejvind er 21 ára gamal, og hann er álopsspælari. Í fjør var hann burtur mesta av tíðini við skaða, men áðrenn tað hevði hann longu roynt seg á besta liðnum hjá HB. Nú verður tað so fyrrverandi venjarin hjá John Ejvind, Krzysztof Popczynski, sum aftur skal venja hann – hesaferð í TB.

Neistin-VÍF 24-21 (11-13):

# Neistin gjørdi sína skyldu

**Neistin hevði veruliga ryggin móti vegginum um vikuskiftið, og kravið var onki minni enn ein sigur, tá VÍF var á vitjan í høllini á Hálsi. Tá veruliga á stóð, vístu Neistamenn tó styrki, og avgjørdu til egnan fyrimun, eftir at hava verið aftanfyri við tveimum í hálvleikinum**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Neistin vann móti endanum við trimum málum um vikuskiftið, í dysti teirra móti VÍF í Atlantic Airways-kappingini. Neistin hevur annars víst óstøðugt spæl seinastu umførini, og nú Kyndil veruliga eru raknaðir við og andar grannunum tungt í nakkan, hevur Neistin ryggin móti múrinum. Hóast hesa sannroynd, megnaði Neistin at vinna 24-21 móti VÍF, í einum sera spennandi og tøttum dysti í høllini á Hálsi.



*Agnar Joensen var enn einaferð drívmegin hjá unga VÍF-liðnum, men tað rakk ikki til stig móti Neistanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA

**Neistin-VÍF 24-21 (11-13)**
10 min: 5-3
20 min: 8-6
40 min: 15-14
50 min: 19-17
**Málskjúttar**
**Neistin:** Karl Herup Olsen 5, Ingi Olsen 5(2), Jugoslav Djumic 4, Dann Thorleifsson 3, Tróndur Kragesteen 2, Roar Dalsgarð 2, Bogi Berg 1, Johann Brekkstein 1, Blagoje Buha 1
**VÍF:** Agnar Joensen 7(1), Regin Joensen 4(2), Rúni Joensen 4, Joen P. Høgnesen 3, Karl J. Djurhuus 2, Niels Andreasen 1
**Brotskøst:** Neistin 3, VÍF 4
**Útvísingar:** Neistin 4, VÍF 4
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

### Taktikkurin virkaði

Hóast VÍF vóru á odda við 13-11 í hálvleikinum, fingu Neistamenn rakt taktiska uppleggið beint á høvdið, tí eftir steðgin fingu teir eina væla byrjan, og fingu javnað, nærum alt fyri eitt.

Eftir góðar tíggju minuttir av øðrum hálvleiki, fekk Neistin eisini lagt seg á odda, og tað støðuna lótu teir ikki sleppa aftur, og hildu munin alla restina av dystinum.

Tá tríggir minuttir írestaðu, tóku VÍF time-out, men tað riggaði als ikki, sum teir óivað høvdu ætla, tí frá at vera bert eitt mál aftanfyri, fullu teir alt fyri eitt trý mál afturum, samstundis sum teir fingu eina útvísing afturat, heilt móti endanum.

Besti málskjúttarnar hjá Neistanum vóru Karl Herup Olsen og Ingi Olsen við fimm málum hvør, meðan Agnar Joensen skoraði sjey mál fyri gestirnar úr VÍF.

# Spælið var nervakent

Sambært rutineraða vestmenninginum Inga Olsen, ið spælur við Neistanum, var spælið hjá heimaliðnum merkt av nervum og ov bráum avgerðum í álopsstøðu.

- Eg haldi at vit høvdu ov nógvar nervar í dag, og kanska er tað orsakað av, at tað er byrjað at gangast Kyndli so væl, og at teir nærkast okkum.

- Álopið hjá okkum gekk ikki ov væl í dag, men eg meti, at verjan stóð nóg mikið stinn, at vit megnaðu at halda VÍF niðuri á so fáum skoringum, og harvið stjala sigurin, sigur Ingi Olsen, ið metur, at Neistin eigur at sláa kalt vatn í blóðið og hugsa um sínar egnu dystir, og ikki dystirnar hjá hinum.

Ingi hevur góðar vónir fyri endan á kappingini, og hann ætlar sær finalusess um FM-heitið.

**-niels**

## Grand Prix-kappingin av

**Seinsta umfarið í Grand Prix-kappingini í badminton varð spæld um vikuskiftið**

BADMINTON
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Badmintonhøllin í Havn var karmur um dystirnar, tá vinnararnir av Grand Prix-kappingini vórðu funnir um vikuskiftið.

Og vinnararnir av einstøku kappingunum vóru hesi:

**Kvinnuunglingar**
1 Fióla Luid
2 Sanna Laksá
3 Guðrið Poulsen

**Kvinnur**
1 Guri Poulsen
2 Brynhild Carlson
3 Lisa Wimmer

**Mansunglingar**
1 Rúni Bláfoss
2 Ari Ellingsgaard
3 Gunnar Eysturoy

**Menn**
1 Tobias Effersøe
2 Niclas H. Eysturoy
3 Rógvi Poulsen



*Tað gjørdist Tobias Effersøe, ið vann vetrarútgávuna av Badminton Grand Prix í 2007/08. Her sæst hann saman við Niclas H. Eysturoy og Rógva Poulsen, sum gjørdist næstir í kappingini*